# Settu punktum í oysandi regni

**Við eini skrúðgongu endaðu um 400 børn í ansingarskipanini hjá Klaksvíkar kommunu evnisarbeiðið, Børn og Heilsa, sum tey serliga hava arbeitt við seinstu tvær vikurnar**

EVNISARBEIÐI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*


*Børn bóru skelti, har ymisk heilsugott og sunt stóð á. Hesum drongurin bar so errin sítt skelti*

**Klaksvík:**
Triðja árið á rað settu øll børnini í ansingarskipanini hjá Klaksvíkar kommunu sín dám á gøturnar, tá tey í skrúðgongu gingu niðan á fótbóltsvøllin, har tey endaliga settu punktum fyri evnisarbeiðinum í ár.

Evnið í ár var Børn og Heilsa, og gingu tey við ymiskum skeltum og øðrum, sum tey høvdu gjørt.

Á fótbóltsvøllinum bjóðaði Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri vælkomin. Aftaná Steinbjørn komu børn frá Fjallafípuni upp á pallin at syngja nakrar sangir. Og síðani sungu øll, bæði børn, starvsfólk og foreldur, nakrar sangir og rørsluspøl.

Veðrið var sera vánaligt, men tað bilti ikki so nógv fyri børnini, sum øll vóru væl ílatin. Tey mongu regnklæðini gjørdu tað ógvuliga litríkt at síggja út yvir tey, meðan tey stóðu so fitt á vøllinum.

Flestu áskoðararnir sótu í skýlinum við vøllin, so alt í alt var dagurin bara heilt góður.

Sum onkur tók til aftaná, at eftirhondini munnu føroyingar fáa tað inn, at tað nyttar onki at ilskast inn á veðrið.

## Afturvendandi tiltak

Hetta er sum sagt triðja árið, at skipað verður fyri hesum tiltakinum, og er ætlanin hjá skipanini at halda fram við hesum á hvørjum ári.

Jórun Niclasen, samskipari av barnaansingini í Klaksvíkar kommunu, sigur, at tað vísir seg, at tiltakið hevur eydnast væl hvørjaferð.

– Endamálið er fyrst og fremst, at øll skulu gera okkurt saman og at gera okkum meiri sjónlig, greiðir hon frá. Og sjálvandi er endamálið eisini, at børnini skulu fáa eina vitan um eitt ávíst evni.

Evnini tey bæði undanfarnu árini vóru Fjøra í 2002 og Myndlist í 2003. Í ár varð tað so Børn og Heilsa, og kom tað av, at heilsa er eitt evni, sum upptekur meginpartin av samfelagnum í dag.

– Vit eru ein bólkur umboðandi allar stovnar og dagrøktina, sum hevur tilrættislagt hetta, og tá uppskotini øll vóru komin á borðið, snúðu so at siga øll seg um eitt hvørt sum hevur við børn og heilsu at gera, og tí varð tað høvuðsyvirskriftin, greiðir Jórun frá.

Síðani valdu stovnarnir, hvussu teir gjørdu víðari. Alt eftir tørvi ella aldursbólkum gjørdu tey av, hvussu tey vildu arbeiða við evninum.

## Íblástur

Jórun sigur, at tað vísir seg, tá tað verður arbeitt á hendan hátt, at hugflogið veruliga fær luft undir veingirnar.

– Øll vilja sjálvandi gera sítt besta, og tað ger jú tiltakið so mikið betur, vísir hon á. Eisini heldur hon, at tey fáa øll íblástur frá hvørjum øðrum, tá tey hava møguleika til at síggja, hvat hini hava gjørt.

Tiltakið fríggjadagin eydnaðist sera væl, men eftirmeting skal til. Jórun sigur, at bólkurin fer at hittast seinni í dag til at eftirmeta tiltakið og so spakuliga at byrja at tosa um, hvussu tað skal verða komandi ár.



*Ein av stovnunum, har børnini eru von við at vera nógv úti í regni, er útibarnagarðurin Fjallafípan*



*400 børn í skrúðgongu í oysandi regni. Fremst gingu børnini í frítíðarskúlanum og spældu upp á trummur*

## 11 knallertir tiknar

Fríggjadagin hevði løgreglan í Havn eitt átak ímóti ólógligum knallertum. Løgreglan tók 11 knallertir, sum á ein ella annan hátt vóru ólógligar.

Vakthavandi sigur, at fleiri eru ov ung til at koyra knallert. Í summum førum eru tað foreldrini, sum hava keypt børnunum eina knallert, men av tí at tey eru ov ung, stendur knallertin í navninum hjá foreldrunum. Í slíkum førum fáa foreldrini eina bót fyri at hava latið eina knallert til ein, sum er undir aldurmarkinum.

Hetta við at fara út atkanna knallertir, er nakað, sum løgreglan ger við jøvnum millumbilum.

– Vit vita, at knallertir verða tað, sum vit kalla, konstruktivt broyttar, og tá eru tær ólógligar og verða tiknar frá føraranum ella eigaranum, sigur vakthavandi á løgreglustøðini.

**-sae-**

# Gravgangur eftir Amariel



Fríggjadagin var fernisering í Leikalund í sambandi við, at Amariel Norðoy lat upp listaframsýning. Rættuliga nógv fólk stukku inn á gólvið, og 17 av teimum 40 verkunum, sum hann sýndi fram, vórðu seld hendan dagin. So ikki kann annað sigast enn, at Amariel er vælumtóktur í sínum heimstaði. Hetta er annars fyrstu ferð í 19 ár, at Amariel hevur listaframsýning í Klaksvík.

Høvuðsevnið í hansara verkum í Leikalund er Mikladalur, og verður framsýningin hangandi uppi til umleið hálvan juli.

**-sae-**



# Havið knýtir okkum saman

**Í síni røðu á hátíðarhaldinum fyri Grønlendska Heimastýrinum um vikuskiftið nýtti løgmaður, Jóannes Eidesgaard høvið til at takka grønlendingum fyri at geva føroyingum veiðimøguleikar í Grønlandi í 50 árunum, tá tað veruliga treyt við øðrum møguleikum hjá føroyingum**

RØÐAN HJÁ LØGMANNI
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



– Vit eru felags um bundinskapin av havinum og tí livandi tilfeingi, ið har er. Vit hava fingið holla vitan og royndir frá okkara forfedrum um havið og náttúruna. Vit hava lært at virða náttúruna, og vit hava yvirlivað, tí vit hava varðveitt okkara mentan, og tí vit hava megnað at umsitið ríkidømið úr havinum og náttúruni á ábyrgdarfullan og skilagóðan hátt.

Vegna Føroya fólk, Føroya Løgting og Føroya Landsstýrið flutti løgmaður, Jóannes Eidesgaard, leygardagin fram røðu á 25 ára hátíðarhaldinum hjá Grønlendska Heimastýrinum.

Hann nýtti høvið til at greiða frá, á hvørjum økjum føroyingar og grønlendingar hava nakað í felag. Løgmaður røddi um felags søguna hjá føroyingum og grønlendingum á fiskivinnuøkinum.

– Vit føroyingar eru ómetaliga takksamir fyri, at vit høvdu møguleikan at fiska í tykkara havumhvørvi í einari tíð, har vit ikki høvdu aðrar veiðimøguleikar. Í hesum tíðarskeiði vóru tøtt og sterk familju- og vinarbond knýtt millum grønlendingar og føroyingar, segði løgmaður millum annað í røðuni til grønlendingar.

## Rúgvandi menning

Stórur partur av røðuni hjá løgmanni var um ríkisfelagskapin, sum knýtir Danmark, Grønland og Føroyar í eina eind. Løgmaður gjørdi vart við, at danir, grønlendingar og føroyingar hava eina stóra ábyrgd fyri, at ríkisfelagsskapurin virkar væl og heldur á at mennast.

Hann helt tað vera av stórum týdningi, at føroyingar og grønlendingar hildu fram við at menna og styrka politisku skipanina í teimum báðum sjálvstýrandi londunum í Ríkisfelagsskapinum.

– Vit hava nú roynt sjálvsstýrisverkætlanina í góða hálva øld. Tit hava roynt somu skipan í 25 ár. Bæði tíðarskeiðini eru stutt, sæðí einum størri søguligum samanhangi, men eg vil kortini hevda, at bæði okkara lond eru komin rættiliga langt, síðan vit fingu sjálvsstýrið, greiddi løgmaður frá.

## Framtíðin

Jóannes Eidesgaard segði eisini, at føroyingar og grønlendingar mugu hava í geyma, at eingin politisk skipan heldur á í allar ævir, og tí er neyðugt at halda á við at eftirmeta ríkisfelagsskapin. Hann nýtti eisini høvið til í røðuna at rósa grønlendingum fyri, hvussu væl teir høvdu megnað at yvirtikið fleiri umráðandi og rúgvumikil málsøkir frá dønum.

– Seinastu 25 árini hava Grønland og Føroyar varðveitt eitt gott samstarv á fleiri økjum. Vit hava megnað væl at finna eitt felags stev í norðurlendska samstarvinum. Eg vil vegna føroyska landsstýrið vóna, at vit í framtíðini kunnu menna og økja samstarvið bæði landanna millum og gjøgnum norðurlendskt og vesturnorðurlendsk samstarv, segði løgmaður millum leygardagin á 25 ára- hátíðarhaldinum fyri Grønlendska Heimastýrinum.

## Løgmaður og hini

**Nógvir navnframir politikkarar hava um vikuskiftið hátíðarhildið 25 ára dagin hjá Grønlendska Heimastýrinum.**

HEIMASTÝRIÐ 25 ÁR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Politikarar og onnur kend andlit ≤úr øllum herðashornum hava um vikuskiftið hátíðarhildið 25 ára dagin hjá Grønlendska Heimastýrinum. Úr Føroyum fóru løgmaður, Jóannes Eidesgaard og løgtingsformaðurin, Edmund Joensen, og frúir til Grønlands fríggjadagin.

### Danmark væl umboðað

Úr Danmark vóru forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, vinnuráðharrin, Bendt Bendtsen og Flemming Hansen, ið er ráðharri fyri norðurlendskum samstarvi, umboðaðir.

Danska Fólkatingið sendi eisini fyrrverandi uttanríkismálaráðharran, Mogens Lykketoft, 1. næstformann, Svend Auken, 4. næstformann, Margrethe Auken og formannin í Fólkatinginum, Christian Mejdahl.

Umframt politisku umboðini úr Danmark, høvdu Drotning Margretha og prins Hendrik eisini leitað sær til hátíðarhaldið.

### Hini norðanlondini

Norski, finski og svenski sendiráðharrin í Danmark hava eisini verið í Grønlandi um vikuskiftið. Finlendingar høvdu eisini forsetan, Aiko Pekka, umboðaðan á hátíðarhaldinum.

Umboðið úr Íslandi var formaðurin í Altinginum, Halldór Blondahl. Sendiráðharrar fyri Thailand, Kanada og USA vóru eisini millum luttakararnar um vikuskiftið.

# Fiskivinnan á breddanum

**Løgmaður, Jóannes Eidesgaard og grønlendski landsstýrisformaðurin Hans Enoksen hildu sunnudagin ein óformellan fund um politisku støðuna landanna millum**

LØGMAÐUR Í GRØNLANDI
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*


*Løgmaður, Jóannes Eidesgaard, og grønlendski Hans Enoksen hildu ein óformellan fund sunnudagin*

Løgmaður Jóannes Eidesgaard og Hans Enoksen nýttu eina løtu sunnudagin at umrøða politisku viðurskiftini landanna millum. Ætlanin var, at íslendski forsætisráðharrin, David Oddson eisini skuldi verið við á fundinum, men innanhýsis trupulleikar í stjórnini í samband við íslendsku fjølmiðlalógina forðaði honum at luttaka á Útnorðurfundinum. Tá tað ikki beyðst íslendska forsætisráðharranum at vera við, hildu løgmaður og grønlendski landsstýrisformaðurin ein óformellan fund sunnudagin. Hans Enoksen og Jóannes Eidesgaard viðgjørdu fyrst og fremst fiskivinnuna.

## Trætan loysast

Føroyingar og grønlendingar hava leingi sita illa um sátt um býtið av rækjunum á økinum 3 L. Hans Enoksen og Jóannes Eidesgaard viðgjørdu trætuna, og løgmaður er bjartskygdur um at finna eina endaliga loysn á málinum.

Mikudagin verður fundur í Keypmannahavn um kongafiskin í Irmingarhavinum. Í samráðingunum um kongafiskin eru Føroyar, Grønland og Ísland bólkaði sum strandalond, og tí avráddu løgmaður og grønlendski landsstýrisformaðurin at leggja nógv fyri, at føroyingar, grønlendingar og íslendingar høvdu eina felags ætlan á fundinum, so úrslitið varð so gott sum gjørligt hjá øllum pørtum.

Seinasta málið á fundinum millum løgmann og Hans Enoksen var um fiskivinnuavtaluna millum Grønland og Føroyar. Í galdandi avtalu ber til hjá føroyingum at keypa grønlendskar avlopskvotur, men hendan skipan hevur virkað illa, og tí setti løgmaður ynski fram um at fáa avtaluna í rættlag.

